# Almennir fundir um smábarnafamiljur

**Mánakvøldið 24. februar bjóðar Javni til almennar fundir runt um í Føroyum. Evnið á øllum fundunum í ár er "Smábarnafamiljurnar"**

FUNDIR
*Ingrid Bjarnastein*



*Javni skipar í komandi viku fyri almennum fundum. Fundirnir er at lýsa støðuna hjá smábarnafamilju m, sum hava fingið barn við breki*
*Tilvildarlig mynd*

– Fólk við menningartarni hava sama virði og somu grundleggjandi tørvir og rættindi sum øll onnur í samfelagnum, men hetta er ikki altíð ein sjálvfylgja hjá familjum, har eitt av børnunum hevur størri ella minni brek og harvið serligan tørv, sigur Javni í tíðindaskrivi.

Í stevnumiðunum hjá Javna stendur, at familjan hjá einum barni við menningartarni skal tryggjast samskipaðan praktiskan og fíggjarligan stuðul, so at hon minst møguligt verður nívd av brekinum.

Nógv er broytt í Føroyum tey seinastu árini, men enn eru fordómar og avmarkingar, tá ið tað kemur til menniskju við menningartarni. Tað sum Javni ynskir er tryggleiki, og at øll kenna seg eiga ein lut í samfelagnum.

Javni ynskir ikki, at foreldur skulu vera óvitandi um hvønn rætt tey og barn teirra hava. Men felagið ynskir at um tú fært eitt barn, ið hevur serligan tørv, so eigur hetta at koma sum eitt tilboð til tín, og ikki at tú skalt út at berjast fyri barnsins rættindum. Tilboð kann t.d. vera um viðgerð, barninum tørvar, og um hvønn rætt heimið hevur, nú tey eru komin í eina nýggja støðu. Kanska er tað persónligur stuðul og praktisk ting fyri at lætta um brekið, alt eigur at verða lagað eftir tørvinum hjá tí einstøku familjuni.

Ætlanin við fundunum er, at ymsir persónar skulu lýsa støðuna. M.a. fara foreldur at greiða frá, hvussu fyrsta fráboðanin var teimum givin, og hvørji tilboð tey so fingu. Eisini vera pedagogar, fólk innan heilsuverkið og almannaverkið við á fundunum. Felagið vil á hesum fundum eisini fáa orð á kommunu- og landspolitikarar.

Tað eru tær lokalu økisnevndirnar sum skipa fyri fundunum, ið verða 24. februar. Fundirnir vera á Sjómansheiminum í Klaksvík, í Mentannarhúsinum í Fuglafirði, á Hotel Hafnia í Havn og á Hotel Bakka í Vági. Hvar fundurin í Vágum verður, er ikki heilt greitt enn. Skráirnar verða lýstar nærri seinri. Øll eru vælkomin.

# Stór summarlega á Sælandi

**Frá 30. juni til 6. juli ár, verður ein stór summarlega, við heitinum »Nordis sommerlejr« í Hillerød á Sælandi. Legan er fyri børn úr Norðanlondum og úr Baltalondum**

SUMMARLEGA
*Ingrid Bjarnastein*

Føroyskum børnum stendur aftur í summar í boði at fara til »Nordis sommerlejr«. Legan er fyri børn, sum eru millum 11 og 14 ár, og hesuferð verður hon í Hillerød á Sælandi.

85 børn sleppa við á leguna, sum varðar eina heila viku, og sleppa tey har at vera saman við javnaldrum úr Norðanlondum og Baltalondum til spæl, ítrótt og ítriv, bæði inni og úti, frá morgni til myrkurs. Útferðir verða millum annað til Tivoli og rundferð í Keypmannahavnar havn. Summarlega umgyrd av skógi og trimum vøtnum.

Kostnaðurin fyri at sleppa við á leguna er 1500 krónur, men tá er ferðin til Hillerød og aftur ikki tald við. Freistin at melda seg til er 22. apríl, og tilmeldingarblað og upplýsingar fáast á heimasíðuni www.nordlejr.dk

Tilmeldingin skal sendast til Den Nordiske Lejrskole og Kursuscenter, Lejrskolevej 4, Dk-3400 Hillerød, Danmark. Teldupostar kunnu sendast til info@nordlejr.dk

# Føroya Banki stuðlar aftur Barnaprixnum

**Fyrireikingarnar til Nósabarnaprix 2003 eru so smátt farnar í gongd, og herfyri skrivaðu fyrireikararnir og høvuðsstuðulin Føroya Banki undir nýggjan sáttmála.**

BARNAPRIX
*Tíðindaskriv*



*Herfyri var nýggjur sáttmáli undirskrivaður í Føroya Banka. Joan Stampe, marknaðarleiðari í Føroya Banka og James Olsen, annar av fyrireikarunum*

Eftir framúr úrslitini í fjør, eru fyrireikingarnar til størsta barnatiltak í Føroyum nakrantíð, Nósabarnaprix 2003, so smátt farnar í gongd, og herfyri varð nýggjur sáttmáli millum fyrireikararnar og Føroya Banka fyri 2003 undirskrivaður.

Nósabarnaprix varð fyrstu ferð hildið í 2002. Endamálið við kappingini var at geva børnum, sum hava gávur at syngja, møguleikan at koma fram. Tiltakið var serstakliga væleydnað, og varð væl móttikið av børnum og foreldrum kring alt landið. So nógv børn teknaðu seg, at tað var neyðugt at kasta lut millum teirra, og heili 300 børn fingu boð um, at tey tíverri ikki sluppu við. Fyrireikararnir rokna ikki við, at tekningarnar til kappingina í 2003 vera færri í tali.

Onkrar broytingar vera í Nósabarnaprix í ár. Tað er ikki longur krav, at løgini skulu vera barnaløg, tey skulu bert vera á føroyskum. Haraftrat verður møguligt hjá luttakarum at royna seg sum tónasmiðir og koma við egnum løgum.

Í fjør varð kappingin skipað við 7 undanumførum umframt finaluna. Av teimum 7 undanumførunum vóru 2 í Havn, men í ár verður bert 1 umfar í høvuðsstaðnum. Kortini sleppa bæði nr. 1 og 2 úr Havn við á finaluna, sum verður á Ólavssøku. Vinningurin fyri 1. plássið er kr. 10.000.

Eins og í fjør verður fløga givin út við løgunum frá kappingini. Við á fløguni vera løgini, sum finalistarnir framførdu á finaluni, umframt 3 av løgunum, sum endaðu á 2. plássi í undanumførunum. Luttakararnir, ið vera við á fløguni fara allir í ljóðstudio, har James Olsen skal leggja teimum lag á.

Børn, sum kundu hugsað sær at verið við í kappingini, kunnu hyggja inn á heimasíðuna hjá Nósabarnaprix: www.barnaprix.fo. Á heimasíðuni eru allar upplýsingar umframt treytir fyri luttøku, men enn noyðast børnini at bíða eina tíð, áðrenn tey kunnu tekna seg.


## Marknaðarfólk

STARV sosialurin

Ert tú fyrikomandi, dugir tú væl at selja, ert tú álítandi, røkin og dugur at arbeiða sjálvstøðugt, so ert tú júst tann persónurin, sum vit leita eftir.

Til marknaðardeild okkara søkja vit eftir starvsfólki, sum kann vera viðvirkandi til framhaldandi at menna inntøkugrundarlag okkara, og sum í ávísan mun eisini kann átaka sær leiðsluuppgávur.

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku bløðunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa og ikki minst arbeiða víðari við góðum hugskotum. Kundarøkt, account-management og telemarketing eru eisini arbeiðsuppgávur, sum vit framyvir koma at leggja enn størri dent á, og kemur starvið eisini partvíst at fevna um hesi øki.

Í samstarvi við starvsfelagarnar á marknaðardeildini verður tú eisini við í dagligu framleiðsluni av blaðnum. Herundir planlegging av lýsingarátøkum, temabløðum og lýsingartilboðum.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú sjálvandi eisini vælkomin at seta teg í samband við Jákup Mørk, fíggjarleiðara, á tlf. 311820. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á jakup@sosialurin.fo

Umsóknarfreistin er 25. februar, og skal umstóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

**Sosialurin**
**Jan Müller**
**Postsmoga 76**
**110 Tórshavn**

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.




# Annlis til reiðar at taka avleiðingarnar

**Á fundi í Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag mánakvøldið, endurtók Annlis Bjarkhamar, at hon vildi fegin at Løgtingsins Umboðsmaður kannaði málið um nýggjan landsantikvar**

LANDSANTIKVARUR
*Áki Bertholdsen*



*Tey, sum halda, at nakað skeivt er farið fram, kunnu leggja málið um landsantikvarin fyri Løgtingsins Umboðsmann, sigur Jóannes Dalsgarð, formaður í Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag*

Hevur Annlis Bjarkhamar borið seg heilt skeivt at, tá ið hon setti Steffen Stumman Hansen í starvið sum landsantikvarur, er hon til reiðar at taka avleiðingarnar av tí.

Tað boðaði hon frá á fundi í Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag mánakvøldið.

Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag kallaði saman til limafundar mánakvøldið.

Ongin skrá varð lýst, men Jóannes Dalsgarð, formaður í felagnum, sigur, at felagð hevur regluligar fundir um dagsins politisku mál og at hetta var ein av teimum.

Men uppundir fundin var ongin sum ivaðist í, at málið um landsantikvarin fór at taka drúgva tíð á fundinum.

Og tað vóru eisini tey, sum høvdu væntað ein rokfund.

Men tað var av ongum, tí Jóannes Dalsgarð sigur, at talan var um ein siðiligan og róligan fund.

### Lítið nýtt fram

Málið um landsantikvarin varð eisini umrøtt, men har kom lítið nýtt fram.

– Landsstýrismaðurin er bundin av tagnarskyldu og tí er tað ógvuliga avmarkað, havt hon kann upplýsa um málið, sigur formaðurin.

Men hann sigur, at Annlis Bjarkhamar endurtók ynski um, at málið varð lagt fyri Løgtingsins Umboðsmann, so at tað kundi verða kannað til botns av einum óheftum stovni.

– Og hon segði eisini, at var niðurstøðan hjá umboðsmanninum, at hon hevði borið seg heilt skeivt at, var hon eisini til reiðar at taka avleiðingarnar.

Jóannes Dalsgarð sigur, at fundurin kom ikki til nakra niðurstøðu í málinum, men tað var heldur ikki ætlanin.

Hann skoytir upp í, at Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag hevur ikki nakað at gera við málið sum so, men hetta er eitt mál í Suðurstreymoy og sum ávirkar valdømi og tí tók felagið tað upp.

### Mugu virða avgerðina

Men formaðurin í Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag leggur afturat fyri egnu rokning, at tað skerst ikki burtur, at í hesum føri er tað talan um ein landsstýrismann, sum hevur óskerdan rætt til at seta tann í starvið, sum hon heldur vera best skikkaðan.

– Hetta er ikki nøkur politisk ætlan um at at seta ein útlending framum ein føroying í eitt starv. Her er talan um, at landsstýrismaðurin metir, at tann eini umsøkjarin hevur havt fleiri pluss á sínari konto enn ein annar umsøkjari og hareftir er starvið sett.

– Tað hevur hon rætt til og tað eiga vit at virða. Men men fyri tað er ikki sagt, at hin umsøkjarin ikki eisini er skikkaður.

Hann sigur, at hann vildi fegin, at tað var ein føroyingur, sum varð settur í starvið.

Spurningurin er, hvat hevði hent, um tað kom fram, at umsøkjarin, sum var best skikkaður, ikki hevði fingið starvið, bara tí at hann var útlendingur.

– Skuldi tað avgjørt vera ein føroyingur, sum skuldi í starvið, var ongin orsøk til at lýsa starvið uttanlands.

Men Jóannes Dalsgarð leggur dent á, at hatta er hansara egnu sjónarmið og hetta er tískil ikki niðurstøðan hjá Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag.

# Bill Justinussen: Órímiligt at tað er so tungt at spara

**Samfelagið skal ikki stýrast av prinsippum, men av tí, sum er rætt og rímiligt, sigur Bill Justinussen**

HEILSURØKT
*Áki Bertholdsen*



*–Tað kann ikki vera ætlanin, at tað skal vera so tungt at spara og tí mugu mannagongdirnar verða smidligari, sigur Bill Justinussen*

Tað verður helst ikki longi, áðrenn Suðuroyar Sjúkrahús sleppur at taka ein serlækna heim at gera nakrar skurðviðgerðir.

Og gongst sum Bill Justinussen, landsstýrismaður í heilsumálum ætlar, skal tað verða munandi skjótari at loysa slíkar trupulleikar í framtíðini.

Tað var herfyri, at tað kom fram, at Suðuroyar Sjúkrahús hevði átta sjúklingar, sum skuldi leggjast undir skurð fyri krossbandið.

Vanliga skuldu hesir sendast av landinum fyri 50.000 krónur hvør. Men nú stóð teimum í boði at fáa danskan serlækna hendavegin at viðgerða allar átta fyri 40.000 krónur tilsamans.

Men tað var lættari sagt enn gjørt, tí tað bar ikki til at fáa fluttar 40.000 krónur av játtanini til serviðgerð uttanlands, hóast talan var um eina sparing fyri landskassan uppá yvir 300.000 krónur

### Ikki orð

Bill Justinussen sigur, at hann hevur ikki orð fyri, hvussu órímiligt hetta er.

– Men hetta er ein avleiðing av, at vit hava eitt eftirlitssamfelag niður í minstu smálutir, har landsstýrismaðurin næstan ikki skal kunna røra seg av ótta fyri at hann skal misbrúka sítt vald.

– Men hetta samfelagið skal ikki stýrast av prinsippum, tað skal stýrast av tí, sum er rætt og rímiligt, sigur hann.

– Tí fer hann nú, saman við Fíggjarmálaráðnum at finna mannagongdir, sum gera tað smidligari at loysa slíkar trupulleikar.

Hann sigur, at fyrsta stigið verður at leggja uppskot fyri tingið um at flyta pening av játtanini til serviðgerð uttanlands til Suðuroyar Sjúkrahús.

Tað verður gjørt heilt skjótt.

Men annað stigið verður at finna greiðar mannagongdir, so at slíkar umsóknir kunnu verða játtaðar skjótt frameftir, tí tað kemur øllum pørtum til góðar, bæði sjúklingum og samfelagið.

Hann sigur, at ein loysn kundi verið, at landsstýrismaðurin fekk ein part av játtanini til serviðgerð uttanlands at hava til taks til slík endamál.

Hann sigur, at játtanin til serviðgerð uttanlands verður bara brúkt til at senda sjúklingar uttanlands. Hon kann ikki brúkast til at fáa útlendskar læknar higar, hóast tað er nógv bíligari.

– Skulu hesar skurðviðgerðir fyri krossbandið gerast á Suðuroyar Sjúkrahusi, skal tað takast av játtanini til sjúkrahúsið.

Játtanin til serviðgerð uttanlands er skerd komandi ár, men tað vsr júst við tí fyri eyga at tiltøk sum hetta hjá Suðuroyar Sjúkrahúsi skuldi bera til, men so má tað gerast smidligari, sigur Bill Justinussen.